## Jólaskipið til Havnar

Klokkan 17 í dag kemur jólaskipið til Havnar. Lagt verður at í Vágsbotni, og jólamenninir fara síðani niðan í býin, har skipað verður fyri ymsum. Eitt nú fáa børnini lyktir at lýsa og blinka við, tá tey taka ímóti jólamonnunum. Skipað verður fyri ymsum tiltøkum. Eitt nú fæst kaffi, kakao og piparnøtur í Byggibúðini hjá Valdemar Lützen. Øll børnini, sum eru saman við vaksnum, fáa eina diodu-lykt, ið bæði blinkar og lýsir, so børnini kunnu blinka og lýsa við lyktunum, tá jólamenninir koma. Millum klokkan 14 og 16 vitjar Nósi í miðbýnum, og framsýningin »Minnist tú« í Degns húsi er opin frá 14-18. Frá 15-20 verður andlitsmáling í Tinghúsgarðinum. GHM spælir, tá skipið leggur at klokkan, og jólamenninir vitja miðbýin. Klokkan 19 syngur Kamarkórið í miðbýnum.



# Hittust fyri seinastu ferð

**Tá ið løgtingið hittist aftur, er tað í øllum førum greitt, at fimm av teimum kendastu andlitunum verða ikki aftur at síggja á tingsins røðarapalli**

LØGTINGIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er í øllum førum greitt, at hesi fimm verða ikki aftur at síggja á Føroya Løgtingi, tí tey hava boðað frá, at tey stilla ikki uppaftur. Frá vinstru eru tað Jógvan við Keldu, Lisbeth L. Petersen, Hendrik Old, Vilhelm Johannesen og Sverri Midjord*

Seinnapartin í gjár varð aftur eitt kapittul skrivað í søguni hjá Føroya Løgtingi. Klokkan 14.15 endaði seinasti tingfundurin í hesum valskeiðinum, og hendir onki óvæntað, hittist Løgtingið ikki aftur, fyrenn eftir løgtingsvalið 19. januar, og tá verður tað sostatt eitt nýtt løgting, sum kemur saman.

Hvør verður valdur í nýggja løgtingið, hvør verður afturvaldur, og hvør verður vrakaður, liggur nú alt samalt í veljarans hond.

Men í øllum førum er tað greitt, at fimm av okkara kendastu politikarum verða í hvussu so er ikki at síggja aftur á løgtingi.

Tað eru Lisbeth Petersen úr Sambandsflokkinum, Jógvan við Keldu úr Fólkaflokkinum og javnaðarmenninir Hendrik Old, Sverri Midjord og Vilhelm Johannesen, sum øll hava gjørt av, at tey stilla ikki uppaftur til løgtingsvalið.

- Tá ið eg sum eykamaður á tingi á fyrsta sinni fyri 37 árum síðani, var tað sum at vera í skúla tann fyrsta skúladagin. Nú eg fari, er tað sum tann seinasti skúladagurin, segði Vilhelm Johannesen, sum var tann einasti av teimum fimm, sum tók orðið í gjár.

Hann nýtti høvi til at takka øllum fyri gott samstarv og ynskti løgtinginum og føroyingum annars alt gott og Harrans signing í framtíðini og eini eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

Eisini Edmund Joensen, løgtingsformaður, takkaði tinglimum fyri valskeiðið.

- Samanumtikið mugu vit siga, at tingarbeiðið hevur gingið sera væl.

Hann takkaði eisini hinum limunum í formansskapinum hjá Løgtinginum, Hergeiri Nielsen og Óla Breckmann, fyri gott samstarv í valskeiðnum.

- Eg haldi, at tað hevur verið sera gott.

Vegna seg sjálvan og vegna alt Løgtingið takkaði hann eisini teimum fimm, sum í hvussu so er ikki stilla uppaftur, hjartaliga fyri ta tíð, tey hava sitið á tingi og ynskti teimum alt gott framyvir.

Edmund Joensen ynskti annars øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár og eitt gott og siðiligt valstríð.

Síðsta gerðin hjá hesum Løgtinginum var at samtykkja eina bráðfeingis játtanarlóg fyri næsta ár, so at tað ber til at halda samfelagnum gangandi og at betala lønir og pensjónir o.s.fr.

Løgtingið endaði síðani hetta valskeiðið við at reisast og syngja Gleðilig Jól, áðrenn hvør fór til sítt at hvessa sær pennarnar til tað stutta, men allarhelst lívliga valstríðið, sum helst ikki verður skotið ígongd av álvara fyrrenn eftir nýggjar, tí hóast stutt er til val, plaga valevnini at lata jólafriðin valda uttan at leggja eftir hvørjum øðrum, ella annars føra valstríð.

### Garvaðir politikarar

Sum tað sæst niðanfyri, eru tað fimm garvaðir politikarar, sum nú ikki stilla uppaftur til løgtingsvalið 19. januar. Kelda til upplýsingarnar er heimasíða Løgtingsins.

### Hendrik Old

Hendrik Old er vágbingur og hevur verið løgtingsmaður síðani 1984. Hann hevur eisini verið formaður í løgtingsins fiskivinnunevnd 1991-92 og 1994-95. Formaður í Tingmannaráði Útnorðurs 1991-92. Formaður í nevndini fyri Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna 1987-95. Formaður í løgtingsins vinnunevnd síðan juli 1995.

### Jógvan við Keldu

Jógvan við Keldu er úr Klaksík og hevur verið løgtingsmaður frá 1988-90 og aftur frá 1998. Limur í uttanlandsnevndini og Norðurlandaráðnum. Landsstýrismaður í innlendismálum frá 31. januar 2004 til 1. desember 2005. Limur í Norðurlandaráðnum í 1989. Limur í stýrinum fyri Klaksvíkar sjúkrahús 1977-84, formaður 1981-84. Býráðslimur í Klaksvík 1971-74, býráðsformaður 1981-88 og aftur frá 1993-2000. Limur í Norðurlandaráðnum 1998.

### Sverri Midjord

Sverri Midjord er av Tvøroyri og varð valdur á ting á fyrsta sinni 1978-80 og síðan aftur frá 1990-94. Hann var annars varamaður á Løgtingið frá 1975-78 og 1985-88. Hann var aftur valdur á ting á seinasta løgtingsvali. Hann hevur annars verið varaformaður í ÍSF í nógv ár og býráðspolitikari á Tvøroyri í mong ár, harav okkurt skifti sum borgarstjóri.

### Vilhelm Johannesen

Vilhelm Johannesen er Klaksvíkingur. Hann hevur verið løgtingsmaður síðani 1980, men var varamaður longu í 1970.

Hetta valskeiðið hevur hann verið næstformaður í fíggjarnevndini og 2. næstformaður Løgtingsins. Hann hevur annars verið fíggjarnevndarlimur frá januar til juni 1989, frá 1991 til 94 og síðan 1998. Hann varð eisini formaður í fíggjarnevndini frá 1992-94.

Hann var limur í Klaksvíkar býráð 1975-84, formaður í Føroya Kommunufelag 1977-79, limur í Vanlukku tryggingarráðnum 1971-75, formaður í stýrinum fyri Norðoya Røktarheim 1984-85. Formaður í stýrinum fyri Klaksvíkar sjúkrahús 1991-1993.

Hann var eisini landsstýrismaður frá 1979 til 1981 og frá 1985 til 1989.

Ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum frá januar 1972 til november 1979.

### Lisbeth Petersen

Lisbeth Petersen er havnarfólk. Hon var býráðslimur í Tórshavn 1984-2000, 1. næstformaður 1984-92, býráðsformaður 1992 -1996.

Hon var starvsstjórnarlimur í Sambandsflokkinum frá 1980-90 og floksskrivari frá 1982-87. Nevndarlimur í Føroya Væl, sum er valfelag Sambandsfloksins í Suðurstreymoy frá 1989-2000 og formaður 1997-99. Næstformaður í Kvinnufelagssamskipan Føroya frá 1982-86. Formaður Sambandsfloksins 2001 - 2004.

Hon hevur verið Løgtingslimur síðan 1990. 2. næstformaður í 1991 og 3. næstformaður í 1992. Formaður í tingbólki Sambandsfloksins frá 2001-2004. Eftir valið 20. januar 2004 limur í fíggjarnevndini og trivnaðarnevndini.

Fólkatingslimur síðan 2001. Varalimur á fólkatingi á heysti 1988, men á hesum fólkatingsvalinum stillaði hon ikki upp.